# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Til minnis um Peter Turtschaninoff



Við stórari sorg frættu vit boðini um at Peter er farin. Í Barcelona í arbeiðsørindum endaði hann sítt virki her á fold, bert 52 ára gamalur. Hetta vóru ófrættaboð at fáa. Men at Peter var í toti við arbeiði og útbúgving, tá boð vóru eftir honum, var ikki óvæntað.

Tí hesin stóri finnin. Hetta stóra menniskjað. Henda norðurlendska eldsálin var ein ígongdsetari og altíð á ferð móti onkrum nýggjum, hvar enn hann virkaði.

Ikki minst tey 5 árini hann var stjóri í Norðurlandahúsinum í Føroyum. Hann hevði altíð stórar ætlanir og visjónir. Summar eydnaðust ikki. Men fleiri bóru frukt.

Peter Turtschaninoff megnaði at halda setningin hjá Norðurlandahúsinum. At draga norðurlendska og altjóða mentan til Føroya. At fáa føroyska mentan út í Norðurlond og umheimin. Og ikki minst at gera Norðurlandahúsið til meira enn ein stovn og eitt hús í Havn og geva íblástur til skapandi virksemi kring allar oyggjarnar.

Peter setti veruliga ungdómin og rocktónleikin høgt á føroyska mentanarpallin. Hann tók stig til sangleikin Skeyk. Og hann byrjaði Prix Føroyar - kappingina. Tiltøk, ið standa sum varðar eftir hann, men sum eisini fara at liva víðari og kasta av sær í ókomnum árum.

Í hinum borðinum á mentanarliga pallinum bílegði Peter fyrstu føroysku symfoniina og gav harvið møguleika til nakað heilt nýtt í føroyskari mentan og laðaði samstundis grundina undir, at Sunleif Rasmussen fekk tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins. Lagnan vildi tað eisini soleiðis, at Sunleif fekk virðislønina handaða í Finnlandi, tá Norðurlandaráðið hevði fimti ára hátíðarhald í Helsinki. Tað gleddi Peter.

Hann fekk skapt sambond millum finsku og føroysku mentanina við fleiri tiløkum og Peter gav eisini samum og samisku mentanini eitt forkunnugt innivist, tá hann skipaði fyri samiskari viku í Føroyum.

Okkurt, sum hann tók stig til, var rættiliga óvanligt og løgið - fyri ikki at siga heilt snedugt. Eg hugsi, at tað var í 1996, at hann skipaði fyri einum sonevndum »ljóðfestivali« í Norðurlandahúsinum. Har komu listafólk ymsastaðni í heiminum, sum arbeiða við ljóði sum listagrein. Ljóð av alskyns slagi fyltu Norðurlandahúsið hesar dagarnar. Eisini var ein djúpur tóni sendur yvir Havnina - av Skansanum og niðan í Norðurlandahúsið. Eg segði tá við hann, at hetta var nakað av tí mest undarliga, eg hevði upplivað.

Men soleiðis var Peter. Hann spenti vítt og stakk djúpt og høgt í tí mentanarliga rúminum.

Ongin ivi er um, at Peter var sorgblíður, tá hansara sáttmáli gekk út sum stjóri í Norðurlandahúsinum. Hann hevði hug at verða verandi í Føroyum, tí ikki bert hansara arbeiðsmegi og hugflog lá her. Hjartað legði seg eisini í Føroyum.

Peter Turtschaninoff tók lut í føroyska samfelagnum á øllum økjum. Hann hevði nógvar vinir, lærdi seg føroyskt, var í grind og til útróðrar. Peter kendi seg sum føroying og við lív og sál tók hann lut í samfelagskjaki um politikk og framtíðina hjá hesum landi. Peter man helst eisini vera fyrsti maður, ið hevur biðið um orðið á flaggdagshaldinum í Havn eftir at Havnar Hornorkestur hevði spælt og flaggrøða varð hildin. Hann fór á røðarapallin og tosaði um støðu Føroya og møguleikarnar í tí altjóðagjørda heiminum.

Afturkomin til Finnlands helt hann á at virka sum eitt slag av ambassadøri fyri Føroyar og hann helt sambandið til Føroya. Hann gjørdi sendingar um Føroyar í finskum útvarpi og kunnaði um Føroyar hvar hann kom.

Og tað gekk eisini hinvegin. Seinastu ferð føroyingar hoyrdu hann í almenninginum, var tá hann sendi úr Finnlandi frá finska ríkisdagsvalinum beinleiðis heim til Útvarp Føroya fyri knøppum ári síðan.

Vit hava nógv at takka Peturi fyri. Hansara drívmegi og stóra hjarta hevur givið føroyingum og Føroyum almikið. Nú orkaði hjartað ikki meira á útbúgvingarferð í Spania. Men tað, sum Peter hevur skapt, livir víðari í okkara hjørtum, huga og verki. Tá vit vitja Norðurlandahúsið. Hoyra og síggja føroysk listarlig avrik. Og ikki minst tá vit síggja tónleikaliga ríkidømið millum ung í Føroyum, fara vit at senda Peturi okkara góðu tankar.

Beint áðrenn Peter fór úr Føroyum, gav hann mær eina bók, sum ein nevnd hjá ST hevur skrivað um týdningin av mentan og mentanarpolitikki. Um týdningin av at virða ymisleikan í heiminum og virðini hjá ymsum fólkum.

Bókin eitur »Okkara skapandi margfeldni«.

Peter Turtschaninoff var ein av teimum serligu vøkstrunum, ið gera heimin til ein meira fruktabaran og fjølbroyttan urtagarð.

Vit lýsa frið yvir minnið um Peter Turtschaninoff.

**Høgni Hoy**dal



SOSIALURIN

JOHN F. KENNEDY FORSETI MYRDUR Í GJÁRKVÖLDIÐ

Konan sat undir lið forsetans tá trý skot smullu og vórðu forsetanum at bana

Skattasamanlegging og nýggj skattastova

## 40 ár síðan J.F. Kennedy varð myrdur

**Í dag, 22. november, eru liðin 40 ár síðan amerikanski forsetin J.F. Kennedy varð skotin í býnum Dallas í amerikanska statinum Texas. Hóast hetta hendi um kvøldið, okkara tíð, høvdu t.d. bæði Dimmalætting og Sosialurin tíðindini dagin eftir**

Á Sosialinum hendi tað, at blaðið var farið til prentingar, tá teir frættu tíðindini. Ein av prentarunum ringdi til Jákup Lindenskov, sum plagdi at vera við til at skriva blaðið. Jákup skrivaði í skundi eina grein og forsíðan bleiv prentað um aftur. Teir áttu eina kliche av Kennedy, so har var eisini mynd av honum á forsíðuni. Blaðið kom tó rættstundis út dagin eftir.

Yvirskriftin á blaðnum var »John F. Kennedy forseti myrdur í gjárkvøldið«. Síðan stóð m.a. at forsetin í USA, John F. Kennedy, doyði í gjárkvøldið, myrdur ev einum ókendum, og varaforsetin Lyndon B. Johnson er nú forseti í USA.

Saman við Kennedy forseta var kona hansara og guvernørurin í Texas, ið eisini var raktur av rifluskoti ókunnumanna. Kennedy var føddur í 1917 og var sostatt 46 ára gamal.

### Dagurin

**22. november. Cecilia,** deyð umleið ár 225. Rómversk genta, sum frá barnsbeini hevði verið kristin. Foreldur hennara góvu hana í hjúnalag við heidnan ungan mann, Valerianus, men sjálva brúðarnáttina umvendi hon hann. Hon varð tikin av døgum í Róm sum pínsluváttur.
Kona ella frilla Brestis æt Cecilia og var móðir Sigmunds Brestissonar. Føroysku nøvnini hava verið Sissal, Silja og Silla.
Cecilia gjørdist verndarhalgimenni fyri tónleik, og tað sigst, at tað er sjálvur Rafael, sum gjørdi málning av henni sitandi við urgu við nótablaði í hendi.
Rómverskt ættarnavn, merkir *tann blinda.*
*Nicolai Mohr var føddur hendan dagin í 1742.*

**23. november. Klæmintsmessa.** Vit vita, at hesin Clemens (deyður umleið ár 107) livdi í Róm, tá ápostulin Pætur var á døgum, og gjørdist triði maður í stóli hansara. Eftir øllum at døma hevur hann skrivað tað brævið, ið verður rópt fyrra Klæmintsbræv, sum er frá ár 96. Um Klæmint sjálvan eru nógvar halgisøgur, og sagt verður frá, at hann endaði dagar sínar við at verða blakaður í havið við einum akkeri um hálsin. Hann hevur síðani tá verið virdur sum ein av verndarmonnunum hjá teim sjófarandi.
Dagurin verður eisini róptur veðurslambsmessa, men tað hevur so ongan kirkjuligan uppruna, men hevur samband við seyðahaldið í Føroyum. Teir halda, at tað er av tí at um hetta mundið verða veðragjólingarnir sleptir út. Aðrir halda, at á hesum degi er kjøtið av veðurlombum, sum var hongt upp um mikkjalsmessu, so mikið búgvið, at tað kann verða etið sum ræst kjøt.
Eisini verður dagurin róptur **fyrsti vetrardagur,** tá ið vetrarfjórðingurin byrjar.
*Skt. Klement monne os vinteren bringe.*
Latínska navnið Clemens merkir *hin mildi.*

**24. november. Chrysogenos,** deyður umleið ár 300. Halgisøgur siga, at hann var kristin einabúgvi, sum varð tikin av døgum meðan Diocletianus var keisari.



# UTTAN ÚR HEIMI



*Soleiðis sá bygningurin hjá bretska bankanum í Istanbul út aftan á bumbuatsóknina hósmorgunin*

# Slaka ikki ein tumma

**Bumbuspreingingarnar í Istanbul hava víst George W. Bush og Tony Blair, at yvirgangsfelagsskapirnir eru líka virknir enn.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Blair og Bush samdir: -Vit slaka ikki ein tumma fyri yvirganginum*

Dagsskráin fyri vitjanina hjá amerikanska forsetanum í London varð næstan ruddað eftir tær ógvusligu bumbuspreingingarnar í Istanbul hósmorgunin. Við atsóknunum vísti altjóða yvirgangurin, at Bush og Blair hava ikki vunnið tann bardagan, sum teir hava lagt so nógva orku í tey bæði seinastu árini. Men teir báðir eru minst líka avgjørdir nú sum fyrr.

– Enn einaferð eru vit mint á, hvussu hesir óndu yvirgangsmenn gera seg inn á ósek fólk. Eg lovi, at vit fara ikki at gera nakrar neyðsemjur, nú vit fara at halda fram við bardaganum, sum hevur til endamáls at oyðileggja yvirgangsmenninar fullkomiliga. Vit fara ikki at slaka ein tumma, segði ein álvarssamur Tony Blair, tá hann og Bush hittu tíðindafólk.

Blair og Bush nýttu bumbuspreingingarnar í Istanbul til at rættvísgera álopið á Irak. Blair segði, at atsóknirnar í Istanbul vísa, hvussu umráðandi tað er at halda fram í Irak, til endi eisini er fingin á yvirganginum har.

– Vit verða verandi í Irak, til uppgávan er fullførd. Hetta seinasta álopið vísir okkum, at kríggið er ikki liðugt enn, og at Irak er tann týdningarmesti vígvøllurin. Eg kann vissa tykkum um, at vit fara ikki at slaka tað minsta. Vit fara at fullføra verkið í Irak og í hinum partinum av heiminum, segði George W. Bush.

Bretland fer framvegis at stuðla USA í bardaganum ímóti yvirgangi, segði Blair. Hann minti á, at tað var ikki Bretland ella USA, sum leyp á al-Qaeda tann 11. september í 2001. Tað var al-Qaeda, sum leyp á USA og harvið á allan tann frælsa heimin. Skulu vit sleppa av við yvirgangin, noyðast vit at standa saman, segði bretski forsætisráðharrin.

– Tapa vit hendan bardagan, eru tað ikki einans okkara lond, sum fara at líða, men fólk um allan heimin, legði hann afturat.

Eisini Bush legði dent á samstarvið tvørtur um Atlantshavið.

– Mannagongdin hjá yvirgangsmonnunum er at ræða fólkið í teimum frælsu londunum og at elva til ótrygg viðurskifti. Bretland og USA standa saman í bardaganum ímóti tí ónda um allan heimin. Vit eru farnir undir eina altjóða mannajagstran fyri at draga teir seku til svars fyri gerðir sínar, segði amerikanski forsetin.

Á tíðindafundinum spurdi ein amerikanskur tíðindamaður Bush, hví tað eru so mong, sum halda so lítið av honum, ja, sum beinleiðis hata amerikanska forsetan.

– Eg veit ikki, hví tey hata meg. Frælsið er gott. Eg skilji væl, at fólk eru ímóti kríggi, men eg vóni, at tey vilja hava frið og frælsi. Uppgávan hjá mær og bretska forsætisráðharranum er at verja okkara fólk, og tað er júst tað, sum eg ætli mær at gera, svaraði Bush.

## Vænta nógva olju

Oljufeløgini vænta at finna ovurstórar oljuleiðir á havleiðunum uttan fyri Lofoten í Noregi, skrivar oljublaðið Upstream.

Sambært blaðnum hava jarðfrøðingarnir funnið fleiri oljuleiðir, og teir halda tað ikki vera óhugsandi, at talan kann vera um olju fyri heilar 700 milliardir krónur. Í Statoil vænta tey, at feløgini fara at finna millum fýra og seks stórar oljuleiðir, men fyribils noyðast feløgini at bíða, tí ikki fyrr enn um ein mánað fáa tey at vita, um tey sleppa at leita í økinum uttan fyri Lofoten.

Eftir at kanningar í Norðsjónum hava avdúkað, at oljuvirksemið kann órógva fiskin, eru norsku fiskimenninir farnir at ivast í, um tað er rætt at lata oljufeløgini sleppa at bora eftir olju við Lofoten, sum er ein av teimum týdningarmestu fiskileiðunum í Noregi. Heimsnáttútugrunnurin er ímóti oljuvinnu við Lofoten, sum økið er gýtingarleið hjá arktiska toskinum, og tí nógvur hvalur eisini heldur til har.

## Ólógligir fiskimenn

Norska ákæruvaldið vil vera við, at fýra russar hava siglt við einum norskum fiskiskapi, uttan at teir høvdu arbeiðsloyvi í Noregi.

Tá menn hjá norsku sjóverjuni vóru umborð á skipinum "Øyliner" og kannaðu veiði og reiðskap seinasta mánadag, varnaðust teir, at fýra av manningini vóru russar. Tá sjóverjumenninir bóðu um at sleppa at síggja arbeiðsloyvini hjá russisku sjómonnunum, vísti tað seg, at eingin teirra hevði nakað loyvi.

Sjóverjan gav so skipinum boð um sigla til lands, og har kom fram, at russararnir eftir øllum at døma hava siglt við norska skipinum í fýra ár. Teir fýra russararnir fingu ímillum 6.000 og 8.000 norskar krónur í bót og vórðu alt fyri eitt sendir við flogfari til Russlands. Ákæruvaldið heldur, at skiparin á "Øyliner" skal í fongsul, og hann kann fáa upp í tvey ára fongsul, skrivar Nordlys. Reiðaríið hjá skipinum skal sambært ákæruritinum hava 80.000 krónur í bót.

## Keypa nógv á alnótini

Tað er vorðið alt meiri og meiri vanligt, at fólk nýta alnótina, tá tey skulu bíleggja ella keypa eitt ella annað.

Í Noregi vísir ein kanning, at norðmenn hava keypt fyri heilar 45 milliardir krónur um alnótina higartil í ár. At talið er so stórt kemst av, at tað umfatar bæði bankatænastur, handil við telduútgerð og ikki minst flogferðaseðlum. Stovnurin MMI, sum hevur gjørt kanningina, sigur, at talið higartil í ár er tvær ferðir størri enn um somu tíð í fjør, og hetta kemst serliga av, at útboðið á alnótini er vaksið munandi.

Tølini vísa eisini, at altsamt fleiri og fleiri kvinnur nýta alnótina, tá tær keypa eitt ella annað. 47 prosent av teimum, sum í dag keypa ígjøgnum alnótina, eru kvinnur. Fyrr vóru tað menninir og serliga menn ímillum 25 og 49 ára aldur, sum vóru best umboðaðir, sigur norska útvarpið. Tann nýggja kanningin vísir annars eisini, at alt fleiri og fleiri norskir pensjonistar keypa á alnótini.

## Tað gongur ikki

Leiðarin hjá drusunum í Libanon, Walid Jumblatt, hevur fingið at sanna, at ein eigur at vanda sær um orðini, tá ein tosar um leiðandi amerikanskar politikarar.

Í síðsta mánað segði Walid Jumblatt, at amerikanski varaverjumálaráðharrin, Paul Wolfowitz, er eitt virus, sum ikki hevur annað uppiborið enn at verða oyðilagt. Hann segði seg samstundis hava somu hugsan sum øll hini, sum finnast at hjálandapolitikkinum hjá amerikonsku stjórnini.

Men kanska skuldi hann tagt. Í hvussu er hevur amerikanska sendistovan í Beirut nú boðað Walid Jumblatt frá, at hann sleppur ikki aftur til USA. Sendistovan hevur ógildað innferðarloyvi hansara. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Walid Jumblatt hevur verið í so opinskáraður. Fyri trimum árum síðani fekk hann øði í sýrisku stjórnina, og hagar sleppur hann heldur ikki longur.